ALS einki fyri okkum

Tað nyttar einki hjá okkum at fara upp í ALS skipanina, siga tvey ungfólk, sum hava mist arbeiðið, nú kryvjivirkið í Vestmanna letur aftur. Tey ætla at finna sær læarupláss ella fara í skúla

ARBEIÐSLOYSI
Edvard Joensen

Vit ætla okkum ikki upp í ALS, siga Emma Poulsen og Dánial Jákup Toftum, sum nú missa arbeiði sítt á Atlantis í Vestmanna

Mynd: Álvur Haraldsen

Vestmanna: Emma og Dánial Jákup ætla sær at finna annað arbeiði, nú Atlantis letur aftur. Men tað verður neyvan í Vestmanna, ásanna tey. At fara upp í ALS skipanina ætlar hvørgin teirra.

ALS ætla tey sær ikki at søkja, tí tey hava fingið at vita at tað loysir seg ikki hjá teimum. Tey hava verið ov stutt til arbeiðis til, at tað fer at geva nakað, er sagt fyri teimum.

Emma Poulsen og Dánial Jákup Toftum eru bæði 17 ára gomul og hava arbeitt á Atlantis, síðan tey fóru úr skúlanum. Hjá báðum var hetta líkasum ein millumstøð, áðrenn tey væntandi fara undir víðari útbúgving.

Emma ætlar sær í studentaskúla, og Dánial Jákup vil fegin finna sær eitt læarupláss og í øðrum lagi aftur í skúla, sigur hann.

Tey vita sær einki arbeiði í løtuni, greiða tey bæði frá. Í Vestmanna er so einki at finna, sigur Emma. Hon hevur spurt seg fyri hjá Føroya Fiskavirking, men hevur fingið at vita, at har er listin rættiliga langur, so har sær hon ongar møguleikar fyri at sleppa upp part. So er tað onkur kiosk, sum kanska kann brúka fólk um kvøldið ella um vikuskiftini. Annars er lítið at vinna í Vestmanna í løtuni, sigur Emma.

Tey, sum fara hiðani, standa við ongum, sigur Dánial Jákup, sum ætlar sær at fara at finna eitt læarupláss. Skúlin kemur í øðrum umfari, sigur hann, um einki læarupláss fæst. Men tað verður so í hvussu er ikki í Vestmanna, tí her er bara Fiskivinnuskúlin, og hann er ikki tað fyrsta, Dánial Jákup ætlar sær at royna, hóast hann hevur arbeitt í fiskivinnuni.

– Eg havi onkran vinmann, sum gongur á Fiskivinnuskúlanum, og alt tað, sum tey har hava fyri, ætli eg mær ikki frívilliga undir, flennir hann.

Emma og Dánial Jákup halda ikki, at tey eru ikki ringast fyri, nú tey hava mist arbeiðið. Tað er verri hjá teimum, sum hava familju at forsyrgja. Fólk sum hava hús og børn, siga tey. Hjá teimum er verri.

Tó halda tey ikki, at tað í so máta er so heilt ringt hjá teimum, sum missa arbeiði á Atlantis.

– Her eru eini trý ella fýra fólk, sum eiga børn, og hjá teimum er tað serliga keðiligt, halda Emma og Dánial Jákup. So eru tað vit ungu, sum eru fleiri. Hjá okkum er tað kanska ikki so ringt. Men so er ein annar bólkur, siga tey og hava hug at smáflenna eitt sindur. Tað eru allir teir gomlu dreingirnir, sum arbeiða her. Teir eru merkiliga nógvir, men teir munnu nokk eisini fara at klára seg. Tað plaga teir, siga hesi bæði ungfólkini, sum nú fara at royna at skapa sær nýggja tilveru uttan fyri Atlantis.

Nú ræður um áræði

Nú hjálpir ikki at leggjast fyri, men heldur bróta upp um armar og fara undir okkurt nýtt, sigur stjórin á Atlantis, sum nú letur aftur. Vestmanna hevur ríkar traditiónir í so máta, so her gerst okkurt, sigur hann

FRAMTÍÐARÚTLIT
Edvard Joensen

Tað gongur nokk, siga vestmenningar og falla ikki í fátt. Ivaleyst verður virksemi aftur her í húsinum, hóast við nú noyðast at gevast, væntar Jákup Oluf Hansen, stjóri á Atlantis

Mynd: Álvur Haraldsen

Vestmanna: Vestmenningar eru ikki falnir í fátt, hóast eitt virki við umleið 20 arbeiðsplássum er afturlatið.

– Vestmanna er ein bygd við ríkum fiskivinnutraditiónum, so her gerst okkurt, hóast laksakryvjivirkið Atlantis letur aftur. Bygningurin verður nú gjørdur klárur til onkran annan at taka yvir, og tað vænti eg eisini fer at henda.

Orðini eigur Jákup Oluf Hansen, stjóri á kryvjvirkinum Atlantis í Vestmanna, sum nú kennir sviðan av vánaligu gongdini í alivinnuni og noyðist at lata aftur.

Sjálvandi eru fólk hørm um, at virkið letur aftur. Tað er eingin ivi um tað, sigur Jákup Oluf Hansen. Men tey taka tað ikki sum nakra vanlukku kortini, at hetta virkið isolerað verður afturlatið. Men at øll alivinnan í Vestmanna er fyrri tí bakkasti, hon er, tað er ein sera dyggur smeitur. Tí har er ikki bara talan um sjálva alingina og kryvjivirkið, men eisini avleiddar vinnur, sum knýta seg at hesum. Og tá verður tað nógv tilsamans.

Hann rósar arbeiðsfólkinum á virkinum fyri tað ábyrgd, tey hava víst hesa tíðina, síðan greitt varð, at virkið noyddist at lata aftur.

Tað líður væl móti einum ári, síðan greitt varð, at virkið fór at lata aftur, tí ILA var staðfest á Vestmanna, og allur fiskur á vágni skuldi takast. Kortini hava fólk trúliga verið til arbeiðis á virkinum líka til tað seinasta, sigur Jákup Oluf Hansen.

Hann sigur, at Atlantis hevur hildið til í leigaðum hølum hjá Vestmanna Fiskavirking. Avtalað er við eigaran, at leigusáttmálin verður uppsagdur, og at bygningurin skal latast teimum aftur í tí standi, hann var, tá Atlantis tók yvir. Tað vil siga, at nú verða maskinur og annað tikið út og roynt verður at selja tær. So er upp til eigaran, hvat verður av bygninginum.

– Men við teimum traditiónum, sum eru í Vestmanna, vænti eg ikki, at hann fer at standa leingi tómur, sigur Jákup Oluf Hansen.

Hann harmast tey umleið 20 fólkini, sum nú standa arbeiðsleys. Sum er, stendur eingin og bíðar teimum við nøkrum arbeiði í Vestmanna. Føroya Fiskavirking hevur tað fólk, brúk er fyri, og onnur virki hava eisini sítt fólk. So líkt er tíverri til, at tey noyðast av bygdini at finna arbeiði. Onkur kanska sleppur til skips. Men ivaleyst noyðist onkur upp í ALS skipanina í fyrstu syftu, heldur stjórin á krivjivirkinum Atlantis, sum noyddist at lúta fyri afturgongdini í alivinnuni.

Yvirskotið tódnar hjá Føroya Banka

Stóru burturleggingar í alivinnuni seta síni spor ársroknskaparúrslitið hjá Føroya Banka. Ársúrlitið í ár er 38 mio. krónur í yvirskoti og hetta er væl minni enn úrslitið fyri 2002. – Roknskapurin er nøktandi, verður sagt úr Føroya Banka

ROKNSKAPUR
Páll Holm Johannesen
pall@sosialurin.fo

Føroya Banki merkir eisini til niðurgongdina í føroyska búskapinum. Yvirskotið er tódnað við 110 mio. krónur sammett við 2002

Nevndin í Føroya Banka samtykti í gjár roknskap bankans fyri 2003. Niðurgongdin í føroyska búskapinum rakar eisini føroysku peningastovnarnar og góðu rakstrarúrslitini hjá Føroya Banka seinastu árini eru við at tódnað.

Ársúrslitið fyri 2003 er 38 mio. í yvirskoti. Hetta er góðar 110 mio. verri enn ársúrslitið fyri 2002, sum var 146 mio. krónur.

Stórar burturleggingar

Føroya Banki hevur verið virkin í føroysku alivinnuni og niðurgongdin í vinnuni setir avgjørt síni spor ársúrslitið hjá Føroya Banka. Tíðliga í heyst var Føroya Banki noyddur at gera stórar burturleggingar í alivinnuni og burturleggingarnar er høvuðsorsøkin til, at yvirskotið hjá bankanum er minka so nógv.

Í fjør setti Føroya Banki setti 110 mio. krónur ímóti tapi og burturleggingum.

Helvtin

Stjórin í Føroya Banka, Jørn Astrup Hansen sigur, at grundleggjandi raksturin hjá Føroya Banka er nøktandi, men tær 110 mio. krónurnar í burturleggingum ávirka roknskapin nógv tann skeiva vegin. Spurdur, um Føroya Banki fer at seta pening ímóti tapi aftur í ár, svarar Jørn Astrup Hansen, at tað fara teir óivað, men upphæddin verður væl minni.

– 110 mio. er alt ov nógv. Stóru burturleggingarnar í fjør komu fyrst og fremst av, at kreppan í alivinnuni kom í einum. Upphæddin til burturleggingar skal ikki verða størri enn helvtin av talinum í fjør og tað er eisini málið í ár, sigur Jørn Astrup Hansen.

Føroya Banki ætlar sostatt at streingja á fyri at fáa burturleggingar og tap niður á góðar 50 mio. krónur í ár.

Minni vinningsbýti

Landskassin hevur seinni árini kunna gjørt sær dælt av stóru yvirskotunum í føroyska fíggjarheimunum. Millum annað hevur landskassin árliga fingið stórt vinningsbýti frá Føroya Banka. Í fjør fekk landskassin 73 mio. krónur í vinningsbýti, meðan upphæddin í ár er minkað niður á 20 mio. krónur.

Jørn Astrup Hansen sigur, at síðvenjan hevur verið, at á leið helvtin av ársúrslitinum hjá bankanum er útgoldið sum vinningsbýti. Í fjør var ársúrslitið 146 mio. krónur í yvirskoti og tá varð útgoldið 73 mio. krónur í vinningsbýtið. Í ár er ársúrlitið 38 mio krónur í yvirskoti og vinningsbýtið er ásett til 20 mio. krónur.

Færri starvsfólk

Fyrst í januar mánað sendi kappingarneytin hjá Føroya Banka, Føroya Sparikassi, 16 fólk til hús. Grundgevingin fyri uppsøgnunum var, at tørvur var ikki so nógvum starvsfólkum longur, tí fíggjarheimunum verður í størri og størri mun automatiseraður og tí er ikki neyðugt við so nógvum starvsfólkum.

Á ársroknskapinum hjá Føroya Banka sæst, at starvsfólkatalið á Føroya Banka er lækkað seinasta árið. Sammett við 2002 arbeiddu 11 fólk færri í 2003 í Føroya Banka.

– Vit hava leypandi gjørt neyðugu tillagingar við starvsfólkatalinum. Hesum ætla vit at halda á vit at gera, so leingi tørvur verður á tí, sigur Jørn Astrup Hansen.

Fakta

FØROYA BANKI

	2003	2002	+/- pst.
Rakstrarroknskapur (mió. kr.)			
Rentu- og kostnaðarinntøkur	264	259	2
Virðisjavnan	-5	33	
Útreiðslur	119	127	-6,2
Tap og burturleggingar	110	-1	
Úrslit av vanligum rakstri undan skatti	47	182	-74
Ársúrslit	38	146	-74
Fíggjarstøða (mió. kr.)			
Útlán	3.512	3.412	2,9
Innlán	3.780	3.832	-1,4
Eginpeningur	1.510	1.492	1,2
Fíggjarstøðujavnvág	5.408	5.525	-2,1
Lyklatøl			
Úrslit fyri hvørja kostnaðarkrónu	2,32	2,42	
Renting av eginpeningi áðrenn skatt, pst.	3,2	12,8	
Vinningsbýti, kr. fyri partabrævið (á 100 kr.)	20	73	
Tal av starvsfólkum við árslok	199	210	

Nú skal Johan Dahl endavendast

Sambandsflokkurin hevði seinnapartin fríggjadagin fund um framtíðina hjá Johan Dahl sum landsstýrismanni í fiskivinnumálum

FUNDUR
Páll Holm Johannesen
pall@sosialurin.fo

Søgurnar um ivasomu fortíðina hjá Johan Dahl gerast fleiri og fleiri í tali. 44 ára gamli Fiskimálaráðharrin hevur róð ein tungan róður seinastu vikurnar og sessurin hjá nýggja landsstýrismanninum gerst heitari og heitari fyri hvørja viku sum gongur.

Í samband við ivasama leiklutin hjá Johan Dahl í fleiri málum kallaði Sambandsflokkurin til fundar seinnapartin fríggjadagin. Formaður floksins sigur, at ætlanin var at viðgera málini, sum hava verið frammi í fjølmiðlunum um fortíðina hjá Johan Dahl.

– Vit fara at viðgera 80 ára frágreiðingina og hansara leiklut í samband við Vágs Skipasmiðju, Kollafjord Pelagic og Nautilus, sigur Alfred Olsen

Seinasta skotið

Fjølmiðlarnir hava seinastu vikurnar kannað fortíðina hjá Johan Dahl og seinasta skotið er hansara ivasami leiklutur í sambandi við Nautilus. Í viðtalu við Fregnir langar Inge Krause Jensen eftir Johan Dahl fyri at hava forpestað sítt lív. Inge Krause er einkjan eftir Carl á Lag, sum saman við Johan Dahl og Petur Nolsøe var við í verkætlanini Nautilus.

Nautilus bar seg ikki og teir tríggir hingu upp á eina stóra skuld. Bæði Petur Nolsøe og Carl á Lag máttu kautionera fyri Johan Dahl, tí landsstýrismaðurin hevði ikki pening fyri sína skuld. Eftir Carl á Lag doyði, arvaði konan Inge Krause skuldarbindingarnar og kautionirnar í samband við Nautilus og hon hevur síðan goldið skuld, sum Johan Dahl ikki vil rinda.